# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarmálaráðið í TAKSinum

Hvar eru okkara politikarar í málinum um MVG av skrásetingargjaldi? Við undantaki av íkastinum frá Kára á Rógvi, so er pínlig tøgn í tinginum um hetta málið.

Tað tykist sum at misskiljingin, at politikarar endiliga ikki mugu hava eina meining um, hvussu umsitið verður, er rættiliga útbreidd í tinginum. Ein slíkur hugburður er demokratisk undanstøkking.

Tað er landstýrismaðurin, sum eigur at tryggja, at umsitið verður á fullgóðan hátt, og harnæst er tað Løgtingið sum eigur at syrgja fyri, at Landstýrið røkjur sínar uppgávur. Renna politikarnir undan síni ábyrgd, so passar umsitingin seg sjálva, og so hava vit ein demokratiskan trupulleika. Serliga um stovnar og umsiting nokta at fylgja niðurstøðum frá kærustovnum, sum eru til fyri at verja borgaran.

Um onkur framvegis heldur, at politikarnir kunnu lata Fíggjarmálaráðið ansa sær sjálvum, so kunnu tey lesa seinasta almenna skrivið fyri at koma á aðrar tankar.

Almenna skrivið frá Fíggjarmálaráðnum uppundir vikuskfitið er einki minni enn ein vátur vøttur frammaná til Palliba og Marsannu.

Boðskapurin er, at um Palliba og Marsanna ikki gjøgnumskoða, at ósamsvar er ímillum tvær lógir og klaga um eitt gjald, so skal tað takast sum, at tey góðtaka gjaldið, sjálvt um tað aftaná vísir seg, at heimildin ikki er í lagi.

Lat okkum taka tað hugsaða dømið, at Palliba og Marsanna keyptu sær bil í 2004 og noktaðu at gjalda MVG av skrásetingargjaldinum. Hvussu langt høvdu tey komið við tí? Hvussu hevði Toll og Skattstova Føroya, sum TAKS æt tá, reagerað? Tað er neyvan nakar, sum við trúvirði kann pástanda, at borgarin hevur havt nakran sum helst kjans at sleppa undan at gjalda MVG av skrásetingargjaldinum.

Eitt annað er, at borgarin hevur álit á, at myndugleikin hevur skil á lógarverkinum. Tað ber ikki til, at ein myndugleiki krevur av borgarum, at hann sjálvur skal eftirkanna, hvørt tað er samsvar millum ymsar lógir ella ikki. Í slíkum førum stólar borgarin blint upp á politisku skipanina og umsitingina, hvørs uppgáva tað er at hava skil á slíkum.

Tá ósamsvar hevur verið millum tvær lógir, so er tað ikki trúverdugt av Fíggjarmálaráðnum í einum almennum skrivi bert at vísa til ta einu lógina, tí Føroya Løgting hevur eisini samtykt hina lógina.

Eitt og hvørt ósamsvar og ein og hvør ivi eigur at koma borgarnum til góðar so skjótt sum feilurin verður uppdagaður. Tað ber ikki til, at vit hava eina almenna umsiting sum setur hægri krøv til borgarnar enn til seg sjálvan.

TAKS kann ikki vera vitandi um heimildarloysi, og so bert gjalda pengar út til nøkur fá, sum hava havt tíð og orku til at fara í rættin við TAKS. TAKS kann heldur ikki páberópa sær fyrning í einum máli, sum Palliba og Marsannu ongan kjans hava at greiða.

Hetta málið handlar um moral og um, at øll eru líka fyri lógini. Nú bíða vit eftir politikarnum. **Sosialurin**

## Skrásetingargjald av bilum

TÍÐINDASKRIV
*Fíggjarmálaráðið*

Føroya Rættur hevur mett, at lógarheimildin í skrásetingarlógini um MVG av skrásetingargjaldinum fyri bilar ikki var nóg greið, og gav tí borgara, ið stevnt hevur, rætt til at fáa afturgoldið tann partin av meirvirðisgjaldinum, sum er roknaður av skrásetingargjaldinum.

TAKS, sum hevur myndugleika á økinum, hevur ikki endaliga gjørt av um málið skal kærast til landsrættin.

**Bakgrund**
Í apríl mánað 1999 samtykti Løgtingið broyting í skrásetingargjaldslógini.

Í viðmerkingunum til hesa broyting verður sagt, at endamálið við broytingini er at gera reglurnar lættari at umsita.

Í viðmerkingunum til lógina varð greitt neyvt frá, hvussu skrásetingargjald og mvg skuldu roknast, og at broytingarnar fóru at geva somu inntøkur til landskassan. Roknidømi vóru løgd við, ið neyvt vístu, hvat skuldi gjaldast til landskassan í meirvirðisgjaldi og skrásetingargjaldi, og at borgarar skuldu gjalda áleið tað sama aftan á at lógarbroytingin var samtykt sum áðrenn.

Tað var tí púra greitt, hvussu høgt gjald løgtingsfólk á vári 1999 atkvøddu fyri at leggja á bilakeyp.

Eisini bilhandlar og tey, ið keyptu sær bil, vistu, hvussu nógv skuldi gjaldast í avgjaldi. Hetta verður eisini prógvað við, at eingin, ið keypir bil í hesum tíðarskeiði, nevnir nakað um, at gjaldið til landskassan var ov høgt.

**Ósemja um, hvussu lógin skal skiljast**
Staðfestast kann nú, at talan er um eitt sera fløkt løggávuøkið, ið fevnir um tvær ymiskar lógir.

Løgfrøðingar á Toll- og skattstovu Føroya, sum TAKS tá varð kallað, gjørdu vart við, at kanska var ósamsvar millum løgtingslóg um skrásetingargjald og løgtingslóg um meirvirðisgjald. Tí var hildið, at rættast hevði verið at nágreina og dagføra løgtingslógina um skrásetingargjald á motorakførum v.m., Nýtt uppskot um hetta var lagt fyri løgtingið á vári 2005.

Eftir hetta verður onkur varugur við, at kanska hevði ósamsvar verið millum lógirnar og før niður í løgfrøðina at leita og helt seg hava rætt til at fáa MVG-ið endurgoldið.

Sostatt er hetta blivið eitt lógartekniskt mál, meiri enn eitt mál, har bilakeyparar hildu seg hava goldið ov nógv.

Tí verður hetta málið nú loyst, so allar lógir verða fylgdar. Og TAKS fylgir sjálvandi øllum lógum á økinum.

**Eingin hevur víst ringan vilja**
Avgjaldið til landskassan hevur í hesum tíðarskeiði verið tað,sum løgtingið ætlaði tað skuldi vera.

Hetta varð neyvt útgreinað í lógaruppskotinum.

Tey, sum hava keypt bilar, hava eisini goldið tað tey hildu tey áttu at gjalda. Eingin gjørdi í tíðarskeiði vart við, at gjaldið til landskassan ikki var rætt, og útrokningarnar í lógaruppskotinum vóru jú eisini almennar.

Bilhandlarar, ið hava kravt inn øll avgjøldini, hava kravt inn tey avgjøld teir hildu vóru tey røttu.

Eingin er førdur bak ljósið í hesum málinum.

## Útlendsk ítróttarfólk á B-liðið



BJØRT SAMUELSEN
Tjóðveldi

Útlendsk ítróttarfólk fáa sersømdir at koma til Føroya. Men afturfyri skulu tey haldast í ein láglønarbólki, og sleppa sostatt ikki at virka á sama hátt sum tú og eg. Hetta er beinleiðis órímiligt og ger, at útlendsku ítróttarfólkini verða dømd at vera á einum B-liði í føroyska samfelagnum, uttan somu møguleikar sum aðrir borgarar.

Eitt útlendskt ítróttarfólk sleppur í mesta lagið at forvinna sær 8616 kr um mánaðin, afturat lønini, tey fáa frá felagnum, tey spæla fyri. Kravið til felagið er einans, at tað betalir spælaranum 9335 kr um mánaðin. Tað merkir, at ein útlendskur spælari í mongum førum einans hevur 17 951 kr um mánaðin at liva fyri. Felagið kann, um tað hevur ráð til tess, lata spælaranum meira í løn, men tað er ikki eitt krav.

Í allar flestu førum hava feløgini ikki ráð til at hava útlendingarnar sum fulltíðar yrkisspælarar, ella geva teimum eina løn, sum er til at liva fyri. Tí noyðast hesi fólkini arbeiða við síðuna av. Her sigur avtalan so, at tey kunnu arbeiða 19,2 tímar um vikuna við síðuna av. Sjálvandi eiga tey at sleppa at nýta sínar førleikar til fulnar, tann partin av arbeiðsvikuni, tey eru á arbeiðsmarknaðinum. Og at forvinna tað, tey nú einaferð hava møguleika til. At noyða tey til einans at forvinna 2000 kr um vikuna, ella 8616 um mánaðin, er at diskriminera ein ávísan samfelagsbólk.

Tað kann ikki vera rætt, at vit bjóða hesum útlendingum heilt aðrar treytir fyri at virka og liva í Føroyum, enn vit bjóða øllum øðrum borgarum. Vilja vit hava útlendingar at seta búgv í Føroyum í eitt tíðarskeið – og tað vilja vit jú fegin – so mugu vit sjálvandi geva teimum somu møguleikar at mennast fakliga, og at arbeiða og forvinna sær pening eins og aðrir borgarar í landinum.

Hetta er bert eitt av mongum dømum um fullkomna høpisloysi í, at okkara útlendingalóggáva verður stýrd úr danska integratiónsmálaráðnum.

Eftir ætlan skuldi útlendingaøkið verið yvirtikið í fjør. Men valdi hendan samgongan at útskjóta eisini hetta týdningarmikla mál til "parkeringsárið" 2011.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.